# Landslæknin

Chief Medical Officer · Sigmundargøta 5 · Postsmoga 9
FO-110 Tórshavn · foe@sst.dk · www.landslaeknin.fo
Telefon +298 311832 · Fax +298 317660

## Starvslýsing

**Landslæknin søkir eftir skrivstovufólki**

Hjá Landslæknanum er eitt nýtt skrivstovustarv (kontorfunktionær) á 22 tímar um vikuna leyst at byrja 1. september 2010.

Vit søkja ein virkisfúsan persón, sum kann taka sær av vanligum skrivarauppgávum umframt meira sjálvstøðugum uppgávum.

**Harumframt leggja vit dent á, at umsøkjarin hevur:**
- Góðan kunnleika til føroyskt og danskt
- Góðan kunnleika til teldu, serliga forritið Word og evt. Excel og PowerPoint
- Góð evni at samskifta og samstarva
- Royndir við heimasíðusmíð er ein fyrimunur, tó ikki krav

Landslæknin er ein statsstovnur undir Indenrigs- og Sundhedsministeriet, sum vegna Sundhedsstyrelsen hevur eftirlit við tí heilsufakliga virksemi, ið løggild heilsustarvsfólk útinna í Føroyum. Landslæknin er ráðgevi hjá danska statinum, Føroya Landsstýri og kommunalum myndugleikum í heilsuligum, hygieiniskum, sosialum og umhvørvisligum spurningum. Landslæknin ger og gevur út árligar heilsulýsingar fyri Føroyar og veitir stuðul til rættar- og løgreglumyndugleikar í rættarlæknaligum og líknandi málum.

**Lønar- og setanartreytir**
Lønar- og setanartreytir eru sambært organisatiónsavtalu millum Finansministeriet og HK/STAT.

**Kunning**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Lonu Johansen ella Liljan Midjord á telefon 311832.

**Umsóknin**
Øll áhugaði uttan mun til aldur, kyn, trúgv ella uppruna verða biðin um at søkja starvið.

Umsókn saman við avritum av viðkomandi prógvum, CV v.m. skulu sendast til:

Landslæknan, Sigmundargøta 5, Postboks 9, FO-110 Tórshavn ella við telduposti til foe@sst.dk, og verða okkum í hendi í seinasta lagi 15. juli 2010.




# Musikkskúlaskipanin

## søkir eftir lærarum til skúlaárið 2010/2011

**Klaksvíkar Tónlistarskúli:**
8 tímar um vikuna í trummum.
7 tímar um vikuna í gittar.

**Tórshavnar Musikkskúli:**
3 tímar um vikuna í musikkspælistovu.
3 tímar um vikuna í klassiskum percussion á miðnámi.
1,5 tímar um vikuna í musikkterapi á miðnámi.

**Suðuroyar Musikkskúli:**
7 tímar um vikuna í gittar.

Lokið prógv frá musikkkonservatorium krevst. Lønar- og setanarviðurskifti sambært sáttmála millum Føroya Musikklærarafelag og Fíggjarmálaráðið. Umsóknarfreist: 12. juli 2010.

Størvini eru tíðaravmarkað.

Umsókn, við prógvi og viðkomandi skjølum, skal sendast til:

**Musikkskúlaskipan Føroya**
att: Martin Mouritsen, leiðari
Hoyvíksvegur 72, FO 100 Tórshavn
martin@mmr.fo
tlf 306567/216462, fax 316991

**Musikkskúlaskipan Føroya**
Hoyvíksvegur 72 · 100 Tórshavn
tlf 316462 / 216462 · fax 316991
www.musikkskulin.fo

**KVINNUHÚSIÐ**
Postsmoga 278 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 317200 · Fax: 313243
post@kvinnuhusid.fo
www.kvinnuhusid.fo

# Námsfrøðingur til Kvinnuhúsið

Søkt verður eftir námsfrøðingi 30 tímar um vikuna at byrja 16. august 2010 ella eftir nærri avtalu. Umsøknin skal sendast til Kvinnuhúsið, Postrúm 278, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 19. juli 2010.

Fremsta uppgávan er, at vera um børnini ið gista á Kreppumiðstøðini. Tann, ið verður settur skal somuleiðis, í samstarvi við dagliga leiðaran, taka á seg allar uppgávur, sum arbeiði í Kvinnuhúsinum ber í sær. Arbeiðsuppgávurnar eru spennandi og fjølbroyttar við nógvum avbjóðingum. Arbeiðstíðin er gerandisdagar millum kl. 8 og 17.

Umsøkjarin skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og hava hug og hegni at samstarva og samskifta við onnur.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Kvinnuhúsið.

Lesið Sosialin -so eru tit við!

Tekniski Skúlin Klaksvík

# Lærarar til enskt

Søkt verður eftir einum lærara at undirvísa SIT- og Handverkslærlingum í enskum C-stig og E-stig frá august í ár. Alt eftir førleika, kann talan verða um fast fulltíðarstarv.

**Setanartreytir o.a.**
Setanartreytir eru eftir sáttmála í millum FTL og Fíggjarmálaráðið.

Skrivlig umsókn við prógvum skal sendast skúlanum í seinasta lagi 9. juli 2010, sum teldupostur á runih@tsk.fo.

Eru spurningar, so eru áhugað vælkomin at venda sær til Rúna Heinesen, skúlastjóra, tlf. 214407.

**Tekniski Skúlin í Klaksvík**
Postboks 20
FO-700 Klaksvík
www.tsk.fo

fk

# Matseðil

Hósdagin 1. juli
**Royktur medistari / Rivjasteik**

Fríggjadagin 2. juli
**Chilli con Carne / Fiskafrikadellur / Stoktur fiskur**

Leygardagin 3. juli
**Svínakambur**

Mánadagin 5. juli
**Stokt flesk / Kókað neytakjøt**

Týsdagin 6. juli
**Forlorin hara / Grýturættur**

Mikudagin 7. juli
**Kjøtfrikadellur / Stoktur fiskur**

*Til ber at keypa døgurða við heim*

**Matstovan í Hoyvík**

